

# Hans Jacob Justesen

**17. aug. 1912 - 3. des. 2005**
**in memoriam**

*Í gamla skúlanum á Bug*
*eg fyrstu ferð hann hitti,*
*hann hyggin var og hevði hug*
*til alt, sum lyndið lyfti.*

*Hann gløggur var í orð og tal,*
*var vitur við tí vísa,*
*so røða hans víst altíð væl*
*var okkum verd at hýsa.*

*Hann gáddi gjølla hugans gerð*
*um mangt, sum vísir skriva*
*um himnaheim og vøklu verð,*
*har lív várt verður livað.*

*Hann vandin um hvørt orð sítt var,*
*at fjøld hann skilja skuldi,*
*um bersøgin hann boð oss bar,*
*hann bros á brá ei huldi.*

*Vit kendu hann sum fróðarmann,*
*sum rík oss menti minni,*
*tá fjálgur hansar fótur fann*
*til oss í stovu inni.*

*Vit hugleiddu um eitt og alt,*
*um heim og himmiríki,*
*og hvussu ymiskt verður valt*
*hjá oss í mannalíki.*

*Nú fann hann um tann evsta flúr,*
*har frægir fedrar fóru,*
*at durva ævinleikans dúr,*
*har døtur burt hann bóru.*

*Um árini, tey runnu út,*
*hann ungur var í sinni,*
*tí kenna vit í stovu sút,*
*nú bert hann er várt minni.*

*Og tó vit kenna tað enn, sum*
*tá onkur klinku nemur,*
*og gestur setur fót innum,*
*at Justesen, hann kemur.*

*Ja, so tað er í okkar verð,*
*at summi seta varðar,*
*at vísa oss hvar leiðin ber,*
*sum betri er enn aðrar.*

*Hans Jacob, tú ein varði var,*
*sum veg um víddir vísti,*
*hvar fótur steig, hvar byrur bar,*
*tú leið um lón oss lýsti.*

*Um høgt tú upp í árum rakk,*
*tú átti mátt at mæla,*
*tí siga vit á Bugi takk,*
*nú tagnað er tín tala.*

**P**

Hansa Hansen, Saltangará:

## 25 ára starvsdag hjá Føroya Fiskavirking



Mánadagin 23. januar 2006 hevur Hansa Hansen í Saltangará arbeitt á flakavirkinum hjá Føroya Fiskavirking (fyrrverandi Lynfrost), í Runavík í 25 ár.

Hansa er ættað úr Rituvík og hevur búð í Saltangará í mong ár. Hon hevur arbeitt á flakavirkinum síðan 1981, so hon hevur arbeitt saman við nógvum fólki og undir ymiskum eigarum og leiðslum. Hon hevur eisini roynt tær flestu av teimum ymisku funktiónunum á virkinum. Fyri nøkrum árum síðan varð hon flutt úr flakahøllini, og tekur hon sær í dag av reingerðingini av skrivstovum v.m á virkinum.

Tá flakavirkið Lynfrost átti skip, hevði Hansa ábyrgdina av árligu høvuðsreingerðini av hesum skipum, og øðrum skipum ið høvdu Runavík sum heimahavn. Hon er røsk og arbeiðssom og dugur væl at skipa fyri.

Hansa er fødd 9. september 1950, dóttir Súsonnu (Sannu) og Hans Lamhauge í Rituvík. Hon er næstyngst av 6 systkjum.

Hansa er gift við Jóhannus Hansen, sum eisini hevur arbeitt leingi á sama arbeiðsplássi, hann hevur verið hjá Timburhandlinum í Runavík í skjótt 40 ár. Tey eiga fýra 4 døtur, Sólvá, sum býr á Skála, Erla og Hildur, sum búgva í Saltangará, og Jónvør, sum býr í Runavík. Ommu- og abbabørnini eru 8 í tali.

Hansa er ein góð omma, sum ommubørnini eru sera góð við, og teimum dáma væl at vitja ommuna og abban. Hansa er heldur ikki bangin fyri at geva eina hjálpandi hond, tá ið á stendur hjá børnum og ommubørnum.

Martin Kúrberg, Eiði:

## Prógv sum rúsevnisviðgeri



26. november 2005 tók Martin Kúrberg á Eiði prógv sum rúsevnisviðgeri á „Institut for uddannelse i Misbrugsbehandling & Psykoterapi" í Kolding.

Talan er um eina 3 ára útbúgvingin, sum er bygd á eitt grundskeið, sum hann hevði tikið áðrenn.

Martin er 38 ára gamal og hevur seinastu fimm árini arbeitt á Blákrossheiminum í Havn

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri vísta samkenslu, tá kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jona Michelsen**

andaðist og varð jarðað.

*Vegna familjuna*
**Ólavur og børnini**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Tina Olsen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á heimarøktini, suðuroyar sjúkrahúsið, ellis- og røktarheiminum. Tøkk til sóknarpestin, kirkjutænarar, sangarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum, fyri blómur og kransar og gávur til blindastovnin og øll, sum vóru og fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Hjartaliga tøkk øll somul við ynskjum um eitt av Harranum signað nýggjár.

**Sunrid, Erolf og Berghild**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

**Dagurin í morgin**

**24. januar. Timoteus**, deyður umleið ár 68. Vinmaður og fylgisveinur hjá Paulusi ápostli, sum skrivaði honum tvey brøv. Eftir fornkirkjuligari frásøgu var hann eftir deyða Páls biskupur í Efesus, men toldi blóðvitnisdeyðan undir Nero keisara eins og ápostulin. Grikst navn ið merkir: tann sum óttast Guð.